| Bachelor í búskaparfrøði (BSc in Economics and Management) | |
|---|---|
| Slag av útbúgving og áramál | 3-ára bachelorútbúgving í búskaparfrøði (180 ECTS) |
| Útbúgvingarstovnur | Universitas Færoensis (Fróðskaparsetur Føroya), Tórshavn |
| Stovnur, ið góðkennir útbúgvingina | Universitas Færoensis (Fróðskaparsetur Føroya), Tórshavn |
| Tíðarbil, ið víst verður til | |
| Stig | Fyrsta umfar – bachelor stig |

| A | Endamál |
|---|---|
| | Endamálið við bachelorútbúgvingini er at bjóða eina fakliga djúptøkna útbúgving í týðandi samfelagsbúskaparligum og virkisbúskaparligum evnum.<br><br>Ítøkiliga er endamálið við bachelorútbúgvingini í búskapi, at<br>1) geva tí lesandi innleiðslu í virkis- og samfelagsbúskaparligu vísindagreinarnar, undir hesum virkisbúskaparlig og samfelagsbúskaparlig ástøði og háttaløg, so tann lesandi fær breiða fakliga vitan og kunnleikar,<br>2) geva tí lesandi fakliga vitan, ástøðiligar førleikar og førleikar í vísindaligum háttaløgum, so tann lesandi gerst førur fyri sjálvstøðugt at eyðmerkja, lýsa og loysa torgreiddar samfelags- og virkisbúskaparligar spurningar<br>3) gera tann lesandi føran fyri at virka í privatum og almennum størvum<br>4) gera tann lesandi skikkaðan til upptøku á framhaldsútbúgvingum, harundir kandidatútbúgving í búskaparfrøði |

| B | Eyðkenni | |
|---|---|---|
| | Greinar / evnisøki | Samfelagsbúskaparfrøði (Economics) og virkisbúskaparfrøði (Management) |
| | Almennur / serligur denture | Yvirskipaða endamálið við bachelorútbúgvingini er at bjóða eina breiða og fakliga djúptøkna útbúgving í búskaparligum evnum. |
| | Vísindalig helling | Vanlig altjóða viðurkend búskaparfrøði. |
| | Serlig eyðkenni | Í tann mun, tað letur seg gera og er ráðiligt, verður áherðsla løgd á greining av evnum, ið metast at hava serligan týdning í føroyskum búskaparligum samanhangi, til dømis umsiting av náttúrutilfeingi og vinnupolitikki í einum mikrobúskapi. |

| C | Starvsmøguleikar og framhaldsútbúgving | |
|---|---|---|
| | Starvsmøguleikar | Bachelorútbúgvingin í búskaparfrøði ger tann lesandi skikkaðan til sjálvstøðugt at røkja størv, ið krevja hollar virkis- og samfelagsbúskaparligar kunnleikar og førleikar. Tann lesandi kann tí við eini bachelorútbúgving søkja størv antin í privata vinnulívinum ella innan almenna geiran - t.d. í almennu umsitingini og fyrisitingini, peningastovnum og fyritøkum. |
| | Framhaldsútbúgving | Studentur, ið hevur staðið BSc-prógv í búskaparfrøði, kann søkja um upptøku á MSc-nám. |

| D | Útbúgvingarháttur | |
|---|---|---|
| | Arbeiðslag í sambandi við læru og undirvísing | Skeiðini eru í standard búskaparligum evnum við fyrilestrum, verkstovum og venjingum. |
| | Próvtøkuhættir | Munnlig ella skrivlig próvtøka krevst í øllum skeiðum. Próvtøkan kann í nøkrum skeiðum skipast sum innlating av skrivligari uppgávu. |

| E | Førleikar, útbúgvingin veitir |
|---|---|
| 1 | Bachelorútbúgvingin í búskaparfrøði veitir tí lesandi førleikar til - við støði í virkisbúskaparligum og samfelagsbúskaparligum ástøðiligum kunnleikum og førleikum umframt háttalagsligum dugnaskapi - antin sjálvstøðugt at røkja størv ella at røkja víðari lestur innan hesi øki. |

| F | Læruúrtøkur frá útbúgvingini |
|---|---|
| 1 | Førleikamál<br>Ein bachelor í búskaparfrøði hevur eina røð av intellektuellum, fakligum og praktiskum førleikum. Teir týdningarmestu er nevndir niðanfyri.<br><br>Intellektuellir førleikar: Ein bachelor í búskaparfrøði dugir at<br>• brúka búskaparfrøðilig ástøði og háttaløg at greina spurningar<br>• útvega sær vitan á føroyskum og enskum<br>• skipa egna læring<br>• grunda yvir brúkbæri og avmarkingar í ástøðum og háttaløgum<br>• skipa búskaparligar spurningar í matematiskar myndlar<br><br>Fakligir førleikar: Ein bachelor í búskaparfrøði skilir<br>• týdningarmestu ástøðini og hugtøkini innan lærugreinarnar roknskapur, fyriskipan (organisation), fígging (finansiering), strategi, søla (afsætningsøkonomi), mikroøkonomi og makroøkonomi, og dugir at brúka háttaløgini hjá hesum lærugreinum (læruúrtøkurnar í teimum einstøku lærugreinunum eru nærri greinaðar í lýsingunum av lærugreinunum hvør sær).<br>• eyðmerking av samfelags- og virkisbúskaparligum spurningum<br>• skilmarking av samfelags- og virkisbúskaparligum spurningum sum fortreyt fyri at seta fram uppskot til loysnir<br>• miðling av greiningum og greiningarúrslitum til týðandi málbólkar<br>• kvantitativ háttaløg til at gera empiriskar kanningar<br><br>Praktiskir førleikar: Ein bachelor í búskaparfrøði kann<br>• arbeiða einsamallur og vera partur av fakligum samarbeiði<br>• grundgeva fyri uppskotum til loysn og grundgeva fyri fyrimunum og vansum í ymiskum uppskotum til møguligar loysnir á praktiskum uppgávum<br>• arbeiða sjálvstøðugt, miðvíst og við stuttum skotbráði<br>• upp á standandi fót greiða frá týdningarmestu búskaparfrøðiligu ástøðunum |